# Næraberg aftur av sildaveiði í altjóða sjógvi

**- Næraberg hevur verið burtur í júst fýra vikur. Í byrjanini var fiskiskapur slakur; síðan var hampiligt at fáa, til nú teir seinastu tveir dagarnar, áðrenn teir góvust at fiska, sigur Jákup Sólstein hjá JFK-Troli.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Næraberg hevur gjørt enn ein túr. Hesaferð hevur skipið verið á sildaveiði í altjóða sjógvi norðanfyri. Teir fiskaðu av pólskari kvotu og vóru hendan túrin undir pólskum flaggi. Á skipssíðuni stóð ikki Næraberg, men Patricia, sum er navnið, ið brúkt hevur verið hendan túrin, nú nationaliteturin var ein annar.



*Hendan túrin fiskaði Næraberg, sum nú leggur veiðina upp í Klaksvík, undir pólskum flaggi og av pólskari sildakvotu í altjóða sjógvi norðanfyri.*

*Mynd: Rúna Sivertsen.*

### Slakur túrur

Jákup Sólstein, sum starvast hjá JFK-Troli, sigur, at hetta var ein heldur slakur túrur hjá skipinum. Teir hava 610 tons av sildafløkum og 90 tons av sildamjøli.

- Næraberg hevur verið burtur í fýra vikur. Í byrjanini av túrinum var fiskiskapur slakur; síðan var hampiligt at fáa, til nú teir seinastu tveir dagarnar, áðrenn teir góvust at fiska. Við Nærabergi hendan túrin hava verið einir 10 póllendingar umframt føroyska manningin.

Jákup sigur, at Næraberg fiskaði av eini pólskari kvotu í altjóða sjógvi, sum er uppá 1500 tons av rundari sild.

Spurdur, hvussu eitt tílíkt flaggskifti kemur í lag, sigur hann, at hetta eru avtalur, sum føroysk feløg gera við pólsk feløg, ið tey samstarva við.

- Hetta eru møguleikar, vit hava, sum byggja á samstarv millum feløg í londunum báðum - og uttan um politisku myndugleikarnar.

Hann sigur, at slíkt samstarv kann vera hent, tá ið brúk er fyri tí.

Tá ið Næraberg er liðugur at leggja veiðina upp í Klaksvík, fer skipið aftur á svartkjaftaveiði í føroyskum og íslendskum sjógvi, og tá verður tað aftur undir føroyskum flaggi.

### Sjúrðaberg eisini undir pólskum flaggi

Jákup Sólstein sigur, at trolarin Sjúrðaberg hjá JFK-Troli eisini hevur gjørt tveir túrar við Svalbard undir pólskum flaggi. Teir fiskaðu av kvotu, sum póllendingar eiga har uppi.

- Tann fyrra túrin høvdu teir 490 tons av avhøvdaðum og frystum fiski; hesin túrurin var liðugur í mai. Á seinna túrinum rakk pólska kvotan til 180 tons av avhøvdaðum fiski, men Sjúrðarberg helt fram at fiska av føroyskari kvotu og hevur nú umleið 420 tons inni.

Jákup Sólstein sigur, at treytin fyri at kunna fiska av pólskari kvotu og undir pólskum flaggi, er, at skippari og maskinsjefur eru póllendingar.

- Annars siglir føroyska manningin undir somu treytum, sum um skipið var undir føroyskum flaggi, sigur hann.

# Hugtiknir og vælnøgdir spaniólar vitjaðu Kósina

**- Tað gongur bara væl við saltfiskinum, sigur Egil Johansen, innkeypsleiðari og sølustjóri fyri saltfiskin á flakavirkinum, Kósini í Klaksvík.**

FORKUNNUG VITJAN
*Vilmund Jacobsen*

Í síðstu viku hevði flakavirkið, Kósin í Klaksvík, forkunnuga vitjan úr Spaniu og Íslandi.

Mikudagin komu ikki færri enn 20 spaniólar og 3 íslendingar við flogfari til Føroya. Hetta eru viðskiftafólk, sum keypa og selja saltfisk, sum Kósin framleiðir. Málið var í fyrsta lagi at vitja Kósina og síggja saltfiskaframleiðsluna hjá virkinum. Men á slíkum ferðum, har so forkunnugir gestir eru á vitjan, er náttúrligt, at vertirnir eisini vísa gestunum ein part av landinum.

Og tað gjørdu klaksvíkingar eisini.

### Í Kirkjubø

Egil Johansen, sum er innkeypsleiðari og sølustjóri fyri saltfiskin hjá Kósini, samskipaði ferðina vegna Kósina hjá útlendsku gestunum í Føroyum.

- Vit vóru eftir gestunum í Vágunum og koyrdu tey fyrst til Havnar. Úr Havn fóru vit til Kirkjubøar, har vit ótu frokost saman. Fyrstu náttina gistu tey á Hotel Føroyum, og norðureftir dagin eftir koyrdu vit eftir gamla Oyggjarvegnum ogsíðan um Eiðisskarð.

Egil sigur, at gestirnir vóru ógvuliga hugtiknir av tí, teir sóu, og nógvar myndir vórðu tiknar á ferðini norðureftir.

- Millum teir 20 spaniólarnar, var ein stórur keypari í Barcelona, og saman við íslendingunum er hesin tann einasti, sum hevur verið í Føroyum áður, sigur hann.

### Væl nøgdir

Egil sigur, at gestirnir vórðu vístir runt á Kósini, og teir vóru sera væl nøgdir við tað, teir sóu.

- Eg vil siga tað soleiðis, at spaniólarnir vóru serstakliga væl nøgdir við alt tað heila, bæði tað, tey sóu inni á virkinum og útferðirnar, vit skipaðu fyri á ferðini.

Meðan tey steðgaðu í Klaksvík, skipaði Kósini fyri eini ferð norður um við Sundabergi, sum júst var afturkomin við 950 tonsum av flaki, og her fingu gestirnir døgurða umborð.

- Leygarmorgunin, áðrenn tey fóru úr Klaksvík, varð farið ein túr við bátinum, Alfa Pilot, og her høvdu vit toskatráður við, sigur Egil.




*Í fjør vitjaðu spaniólarnir í Noregi og fyrraárið í Íslandi. Nú var so túrurin komin til at vitja á Kósini í Klaksvík.*
*- Gestirnir vóru sera væl nøgdir við vitjanina her hjá okkum, sigur Egil Johansen, sum samskipaði ferðina fyri Kósina.*

*Mynd: Jan Muller.*

Á vegnum vestureftir aftur leygardagin, sluppu gestirnir eisini ein túr undir Vestmannabjørgini, og hesin túrurin var ikki minst hugtakandi.

- Leygarkvøldið gistu tey á Hotel Vágum, har borðreitt varð við køldum borði, og sunnumorgunin flugu gestirnir heimaftur, sigur Egil.

### Gongur væl

Spurdur, hvussu tað gongur við saltfiskinum hjá Kósini, nú so nógv hevur verið frammi um trupulleikar á saltfiskamarknaðinum, letur Egil væl at.

- Vit kunnu ikki klaga, tí vit hava ongar trupulleikar havt av saltfiskinum í vetur. Prísirnir, bæði á innkeypi og sølu, eru lækkaðir nakað, men hetta hevur ikki tarnað saltfiskaframleiðsluni hjá Kósini.

At kalla allur toskurin, sum virkið framleiðir til saltfisk, fer til Spaniu, meðan brosman og longan fara til Italiu.

Egil Johansen hevur starvast á Kósini síðan 1998.

